Sosialurin








ÓLI JACOBSEN
olij@sosialurin.fo



*Kend mynd av Tom og Nikláa*



# Anna hjá Tom fór í grøvina hjá beiggja sínum 30 ár aftaná

**Hesa ferð er okkara frásøgn um tríggjar gravir, sum hava eitt slíkt samband, at tað ber ikki til at viðgera tær hvør sær. Hesar gravir eru hjá: Dánjal Jensen, Onnu og Tom Nicolajsen, Agnas og Jógvan Jensen Ása, Amaliu og Nikláa Skála**

Sambandið teirra millum er, at Ása var dóttir Amaliu og Nikláa, at Tom, Niklái og Agnas vóru systkin og Jógvan, Anna og Dánjal vóru systkin.

Hesi seinastu vóru ættað av Dul á Strondum, og tí var tað, at synirnir hjá Jógvani og Agnas fingu sær á Dul til eftirnavn.

Tað undrar eitt sindur, at tann fyrsti í grøvini hjá Onnu og Tom er Dánjal, sum er deyður knappliga 19 ára gamal í 1906. Tá ið Anna doyr í 1935 verður hon grivin í somu grøv, og tá ið Tom doyr í 1951 verður hann náttúrliga jarðaður undir liðini á konuni.

## Jógvan misti beiggjan fyri borð

Tað er ikki eydnast at fáa nakað serligt at vita um Dánjal. Tað sum ættin hevur greitt frá er, at hann fer til skips saman við Jógvan beiggja sínum sum skipara. Dánjal slær út, men tað eydnast at fáa hann umborð aftur. Hann er kortini so illa fyri, at hann fær lungnabruna. Tað er einki sum eitur pensilin tá í tíðini, og hann doyr.

Spurningurin kann so vera, hví hann er grivin í Havn, tá ið hann er av Strondum. Jógvan og Agnas búðu tá eisini inn á Strondum.

Frágreiðingin kann vera tann, at Dánjal er deyður í Havn. Í 1906 var eingin ruta inn á Strendur, og tað hevur verið sínar sakir at flyta eina kistu við báti inn á Strendur. Tí hevur tað verið lættast at jarða dreingin í Havn.

Tað eru fleiri, sum vórðu uppkallaðir eftir Dánjal. Ein er Dánjal á Dul í Havn, kendur sum lærari á sjómanssskúlanum. Hann varð føddur sama ár sum pápabeiggin doyði.

## Fóru til Suðroyar og vórðu uppkallaðar

Tey á Dul vóru annars átta systkin. Foreldrini vóru Jógvan Jensen og Súsanna Kristina á Strondum.

Tvær systrar vóru giftar til Suðuroyar. Onnur var Malena, sum var gift við Zacharias Bech. Tey fingu sjey børn.

Hin var Jóhanna, sum giftist við Jacob Bech, og fingu tey eisini sjey børn.

At vera giftur til Suðuroyar var sera langt tá í tíðini. Tað var kanska ikki sum at vera deyður, men tá ið Agnas og Jógvan fingu sína fyrstu dóttir, varð hon kallað Jóhanna Malena (seinni Sundstein) eftir systrunum, sum vóru so langt av landi skotnar!

Hini systkini á Dul á Strondum vóru Jens Kristjan, giftur við Ingu, Daniella og Sofus Kristian, giftur við Louisu.



*Tom og Anna sum brúðarpar*

## Forfedrarnir í Havn

Pápi Agnas, Tom og Nikláa var Conrad Nicolajsen (1842-1916), sum var eitt tað fyrsta postboð í Føroyum. Rutan gekk úr Havn og heilt norður til Viðareiðis. Kona hansara var Sigga Karolina Reinert f. 1839 í Kaldbak. Tey búðu fyrst í Klausstovu úti á Reyni. Men so bygdu tey í tí, sum nú eitur Grím Kambansgøta 16. Hetta varð tá kallað Úti í Bø, langt av landi skotið, og verður enn kallað Konradsbrekka.

Tey bæði fingu umframt tey nevndu trý børnini, eisini Mariu, sum verður umrødd seinni. Hon doyði í 1960 og er grivin í nýggja kirkjugarði.

## Jógvan (1876-1923) og Agnas (1881-1945)

Jógvan og Agnas giftust jólaaftan 1905 og búði fyrstu árini á Strondum, men fluttu til Havnar í 1908.

Jógvan sigldi, men hann doyði bert 47 ára gamal, tá ið yngsta barnið var ársgamalt. Agnas tók lærarapróvg í 1899 bert 18 ára gomul, men hon kom tó ikki at arbeiða nógv í hesum yrki. Hon gjørdist eisini sjúk av tuberklum, og børnini máttu fara aðra staðni at vera eina tíð.

Tey bæði fingu børnini: Dánjal, Signhild, Johanna Malena, Jógvan, Jákup, Páll, Grímur, Bjørga og Maria

Av hesum livir bert Mia, sum er 85 ára gomul.

## Anna (1881-1936) og Tom (1877-1950)

Tey fingu børnini Sigfried, Hjørdis, Sanna, Konrad, Hjalti og Bjarki

## Niklái (1872-1952) og Amalia (1882-1938)

Tey fingu børnini Óla Kristian, Arngrim, Tóru, Nannu og Sjúrður

## Tom og Niklái

Tað ber illa til at nevna annan av hesum uttan at nevna teir báðar. Teir vóru kendir sum fergumenn í Havn ta tíðina, tá ið ferðamannaskip ikki kundu leggja at, og ferðafólkið mátti førast í land við báti.

Ein av teimum, sum kendi teir báðar er tann 91 ára gamli Jógvan Gerðalíð í Klaksvík. Hann hevur greitt eitt sindur frá tí, sum hann minnist frá teimum:

Nógvar søgur eru um »Fergutom«. Ein er, tá ið hann einaferð legði at ferðamannaskipinum Dronning Alexandrine. Ofta lá frálop út gjøgnum síðuna á skipinum. Vindur kundi so físa og gera fortreð, sum tað gjørdi hendan dagin. Tom bað dekksdrongin umborð rópa stýrimannin út á lúnninigina.

»Dav Tom, hvad nu Tom?« Tom svarar: »Hvorfor kan Dronningen dog aldrig holde vandet?« Og so risti stýrmaðurin við høvdinum: »Nei Tom, nei Tom!«

Tom var tiltikin sum aktionarius ella uppboðshaldari. Tá í tíðina vóru nógvir, ið fóru fallit. Hesar uppboðssølur minnist eg væl sjálvur og hetta vóru



**Komandi partur**

Komandi frásøgn verður um Honnu Katrinu Fredrikku og Johan á Lava

*Agnas og Jógvan saman við sjey av børnunum. Børnini í aftara rað eru f.v.: Dánjal, Signhild, Grímur og Johanna. Fremra rað: Jógvan, Páll og Jákup.*



*Konrad Nicolajsen var pápi Tom, Nikláa, Mariu og Agnar*



*Maria Magdalena var ein systir*



*Grøvin hjá Agnas og Jógvan.*

*Innskriftin:*
*GUD HEIMIN HEVUR ELSKAÐ SO*
*AT SON SÍN HANN GAV*
*TIL FRELSU FYRI HVØNN IÐ VIL*
*TÍ FRELSU TAKA AV*

*STÓRA STÓRA KÆRLEIKSHAV*
*GUDS KÆRLEIKSHAV, O, SJÁ*
*SUM SENDI SONIN SÍN TIL JØRÐ*
*TIL DÓM Á GOLGATA*



*Her liggja Tom, Anna og Dánjal.*

*Innskriftin er:*
*SÆL ERU TEY TÍ TEY SÍGGJA ÁSJÓN HANSARA*
*Opinberingin 22,3*



*Her er Amalia saman við Ásu t.v. og Nannu*



*Hetta ery synirnir hjá Amaliu og Nikláa. F.v. Arngrim, Sjúrður og Óla Kristian. Sjúrður er tann elsti eftirlivandi í hesum ættarliðnum. Hann er 95 ára gamal*



*Hetta er grøvin hjá Nikláa og Amaliu. Í grøvini liggur eisini dóttirin Ása, ið doyði í 1932, bert 14 ára gomul, av menigitis. Ása og Rigmor Restorff vóru vinkonur.*

*Á steininum er henda innskrift:*
*SÁA Í VEIKLEIKA, RÍSUR UPP Í STYRKLEIKA*
*1. Korintbræv 15,43*

sera stuttligar løtur. Nógvar søgur og niðursetandi viðmerkingar vóru um seldu vøruna. Hetta mundi tó ikki vera líka stuttligt fyri teir, ið fóru á húsagang.

Tom var sera kringur at fáa væl burtur úr, men onkuntíð fekst ikki boð, og tá dugdi hann væl at taka til. Hann skuldi siga um ein mjølsekk: »Tit fáa einki stríð av honum. Hann klárar at ganga heim sjálvur.« Tað vildi siga, at so nógvur mølur var í sekkinum. Hetta kundi ofta fáa menn til at kappbjóða, so prísurin ofta gjørdist hægri enn veruliga virðið.

Øll mannfólk gingu við "kepp", um tey ikki høvdu føroyska húgvu. Tom brúkti ikki nakað á høvdinum. Var tí kallaður hattleysi Tom, ella Tom hattleysi..

Væl dámdi Tom at spæla. Jákup, sonur okkara, skuldi altíð renna um gólvið og inn í stovuna. Einaferð, tá ið Jákup mundi vera tvey ella trý ár í 1944-45, var Tom hjá okkum. Hann helt, at hetta mundi hann fara at klára eins væl og Jákup, og teir so at kapprenna kring óvanliga stóra køksborðið. Eg mátti steðga Tom, væntaði at hann fekk krampa av møði og látri.

Tom var hin vinarligi, skemtingarsami, kviki, netti, høfligi, hjálpsami. Hann var gentlimaður og bar útlenskan dám. Gekk rankur og kvikliga..

Nikláa kendi eg ikki so nógv. Haldi hann var føroyingur burtur av. Álvarsamur, einki fjas. Eg haldi ikki, at hann hevði nakað av hesum skemtingarsama í sær, og eg haldi ikki, at hann fangaði tað. Ella kanska ikki tímdi at fjasa. Álvarsbrá lá yvir honum.

Tom hevði ikki kunnað funnið uppá sumt av tí, Klái loyvdi sær.

Samfundsmøti var á Varpinum í Klaksvík. Vit møttust á trappuni.

»Nú hvussu er tað tú sær út, bróður?« Tá hevði hann raka sær og nøkur smá »frímerkir« her og har á høku og kjálkum. »Eg veit ikki, eg gloymdi at seta hatta í.« Tá hevði hann rakað sær uttan at seta kambin í maskinuna. Men tað forðaði ikki Kláa í at fara á møti.

Hann hevði stuttar vitnisburðar á møtum. Eina ferð leyp hann upp á stólin hann sat á, helt sær um ein stólpa, og segði tað hann hevði á hjartað.

Teir høvdu tíðum stuttar vitnisburðir. Haldi ikki teir høvdu tol við langum talum ella fyrilestrum.

Eg var nokk so nógv saman við Tom. Eisini nakað saman við honum við Sendiboðnum, bátinum sum Klaksvikingar nýttu at ferðast til bygdirnar at halda møti.

Alt í einum meðan vit práta, kundi hann loypa upp, blaka seg á knøini og fer at biðja. Motorurin gekk, so tað var ikki altíð, at vit varnaðust hann. Men tað gjørdi ikki mun hjá honum. Hann læt okkum bara práta víðari.

Eg havi ikki sæð so góðar brøður. Hvussu leingi teir stóðu á helluni á Eiði einaferð veit eg ikki. Teir hálsfevndust og skuldu siga farvæl. Vit høvdu verið nakrar dagar og havt møti har.

Munurin á teimum báðum kann verða lýstur soleiðis, sum teir vildu biðið sær hjálp at draga bát.

Tom vildi sagt: »Vælsignaðir, komið og dragið mær bátin, tit eru altíð so vinarligir og fittir.« So fóru teir, fegnir fyri at kunna hjálpa.

Klái hevði sagt: »Komið her og dragi bátin!! Tit standa har fyri einki álíkavæl.« So fóru teir eisini fegnir fyri at kunna hjálpa.

Um Tom er annars at siga, at hann sum ungur var í handlinum hjá Jørgen Bech & Sønner í Oyndarfirði.

Seinni var hann hjá Skibsted í Havn og á Strondum. Hann arbeiddi eisini á bryggjarínum Ydun og hevði seinni heilsølu.

Niklái hevði upprunaliga eftirnavnið Nicolajsen. Umframt at vera fergumaður gekk hann fast við posti til Kvívíkar og víðari við báti til Fútaklett.

Niklái var giftur við Amaliu f. Joensen, úr Kova í Hesti. Mamma hennara var úr Toft í Miðvági. Pápin kallaðist Óli. Amalia og Niklái giftust í 1909.

## Maria

Maria var ein sermerkt kvinna. Hon er komin í okkara skúlasøgu sum tann fyrsti – og kanska einasti lærarin í Føroyum - sum varð uppsagdur vegna tess, at hon gjørdist »baptist« og lat seg doypa. Tað er greitt gjølla frá hesum í Tórshavnar Skúlasøgu.

Hetta gjørdist eitt sera eldfimt mál hjá skúlakommissiónini. Fyri Mariu var hetta eitt avgerandi mál, og tað endaði sum sagt við, at hon varð uppsøgd. Seinni hevði hon privatskúla í Klaksvík.

Maria var gift við Jóhannes Joensen av Selatrað. Børn hennara vóru Conrad Joensen, Sigurd Berghamar og Jóna Joensen.

Sigast kann, at her er talan um eina sermerkta familju, sum munandi meira kundi verið skrivað um, men hetta má bíða til eina aðru ferð.

*Keldur:*
*Keraldið*
*Ættin*